UTTAN ÚR HEIMI

# Smágentur horvnar

**Bløð í Bretlandi lova nú 11 milliónir krónur í finningarløn, um onkur kann siga, hvar tvær horvnar tíggju ára gamlar gentur eru**

BRETLAND
*Árni Joensen:*

Tær báðar genturnar hvurvu seinasta sunnudag, og løgreglan ber ótta fyri, at Jessica Chapman og Holly Wells eru burturfluttar.

– Í fyrstani hildu vit, at tær royndu at ræða foreldrini og okkum. Síðani hildu vit, at hetta mundi vera eitt ella annað slag av einum óhappi, men sum dagarnir eru gingnir, noyðast vit tíverri at viðganga, at hetta líkist meiri og meiri einari burturflyting, sigur løgreglumaðurin David Hankins.

Blaðútgevarafelagið Express News-papers, sum gevur út bløðini Daily Express, Sunday Express og Daily Star, hevur boðið sær til at rinda 11 milliónir krónur í finningarløn, um onkur kann koma við upplýsingum um, hvar genturnar eru. Hetta er nógv tann størsta finningarlønin í Bretlandi í sambandi við mál sum hetta.

Mikudagin legði løgreglan hald á ein hvítan vøruvogn, tí onkur segði seg hava sæð bilin á staðnum, sum genturnar vóru á, tá tær vórðu sæddar seinast sunnukvøldið.

Jessica Chapman og Holly Wells vóru í troyggjum hjá fótbóltsferlagnum Manchester United, tá tær hvurvu. Á rygginum stóð eftirnavnið hjá tí kenda David Beckham, og tað fekk týskvøldið Beckham til alment at biðja genturnar koma heimaftur.

Løgreglan hevur leitað við hundum og tyrlum, men higartil uttan úrslit. Nógvir løgreglumenn og fleiri hundrað sjálvboðin hava tikið lut í leitingini.

Jessica Chapman var og vitjaði vinkonuna Holly Wells sunnudagin. Seinnapartin ringdi hon til hús og spurdi, um hon kundi eta døgurða saman við vinkonuni, og tað fekk hon loyvi til. Samstundis avtalaðu hon og foreldrini, at hon skuldi ringja, áðrenn hon kom til hús, so pápin kundi koma ímóti henni. Men hon ringdi ongantíð.

Løgreglumenninir, sum fyri tveimum árum síðani leitaðu eftir gentuni Sarah Paynes, leita eisini nú eftir Jessicu Chapman og Holly Wells. Sarah Paynes hvarv í Sussex í juli í 2000, tá hon var og vitjaði ommuna og abban. 17 dagar seinni varð hon funnin myrd og grivin niður.

# Blóðug forsetainnsetan

**Hátíðarløtan, tá nýggi forsetin í Kolombia varð tikin í eið, varð órógvað av granatbrestum. 14 fólk lógu eftirá**

KOLOMBIA
*Árni Joensen:*



*Alvaro Uribe, forseti heilsar formanninum í tjóðartinginum beint aftan á innsetanina, sum varð órógvað av trimum granatspreingingum, sum kostaðu 14 mannalív*

Nývaldi forsetin, tann høgrasinnaði Alvaro Uribe, varð tikin í eið í tinghúsinum í høvuðsstaðnum Bogota.

Um somu tíð brustu tríggjar granatir í einum fátækrabýlingi tætt við tinghúsið. 14 fólk, teirra millum trý børn, doyðu.

Kolombisku myndugleikarnir høvdu frammanundan fingið eina ávaring frá teirri vinstrasinnaðu rørsluni FARC, og tí vóru 20.000 hermenn og løgreglumenn á varðhaldi kring tinghúsið og aðrastaðni í høvuðsstaðnum. Kortini eydnaðist tað FARC at skjóta granatirnar inn í fátækrabýlingin, men myndugleikarnir ivast ikki í, at ætlanin var at raka tinghúsið.

Nývaldi forsetin helt júst røðu fyri tjóðartinginum, tá granatirnar brustu. Brestirnir hoyrdust ikki inni í tinghúsinum, men embætismenn forsetans tutlaðu honum í oyrað, hvat var á vási uttanfyri.

Í røðuni hevði forsetin júst umrøtt stríðið millum myndugleikarnar og ta vinstrasinnaðu uppreistrarrørsluna. Uribe segði, at hann ætlar sær ikki at slaka fyri uppreistrarmonnunum, og at hann fer einans at samráðast við FARC, um rørslan leggur vápnini.

– Vit bjóða teimum demokrati, soleiðis at orðaskifti kann koma ístaðin fyri vápn, segði Alvaro Uribe.

Júst bardagin ímóti harðskapinum var høvuðsevnið hjá Alvaro Uribe undir valstríðnum. Hann lovaði at fáa enda á bardøgunum, sum hava herjað Kolombia seinastu 38 árini.

# Vandi fyri statskvetti í Saudiarabia

**Støðan í Saudiarabia er ótrygg, og vandi er fyri, at tann ráðandi greinin av kongsættini verður koyrd frá, siga vesturlendskar fregnartænastur**

SAUDIARABIA
*Árni Joensen:*

Seinastu mánaðarnar hava fleiri mótmælisgongur verið í Saudiarabia, har fólk hava mótmælt teirri greinini av kongsættini, sum situr við valdið. Vesturlendskar fregnartænastur, sum fylgja við gongdini, siga vanda vera fyri, at virkandi kongurin, Abdullah krúnprinsur, kann verða koyrdur frá, og at aðrar kreftir í kongsættini fara at taka við.

Lagt verður afturat, at hesar kreftirnar hava samhuga við yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda hjá Osama bin Laden, sum er ættaður úr Saudiarabia. Higartil hevur júst Saudiarabia verið roknað sum eitt av teimum fremstu sameindu hjá USA í bardaganum ímóti yvirgangi.

Mótmælisgongurnar ímóti teirri ráðandi kongsættini byrjaðu í mars, eftir at 14 ungar gentur brendu í hel í einum skúla, tí tann serliga átrúnaðarløgreglan sýtti fyri at hjálpa gentunum úr tí brennandi skúlanum. Bretska blaðið The Observer veit at siga, at seinastu mánaðarnar hava mótmælisgongur verið um at kalla alt landið, og at løgreglan hevur bart tær niður við harðari hond.

## Bumbuatsóknir

Tann fremsti avbjóðarin hjá Abdullah krúnprinsi er Sultan prinsur, sum er verjumálaráðharri, og hann hevur fleiri ferðir funnist at krúnprinsinum, sum hann heldur vera alt ov vinarliga sinnaðan ímóti Vesturheiminum.

Hildið verður, at innanhýsis fíggindarnir hjá Abdullah krúnprinsi hava skipað fyri fleiri bumbuatsóknum at vesturlendskum málum, og at tað eru víðgongdir menn við tilknýti til al-Qaeda, sum hava framt sjálvar atsóknirnar. Eingin saudiarabi er tikin í sambandi við atsóknirnar, men myndugleikarnir hava ístaðin tikið fimm bretar, ein kanadiumann og ein belgiumann og lagt teir undir at hava havt samband við bumbuatsóknirnar.

Vesturlendsku fregnartænasturnar siga, at skuldi Fahd kongur doyð, fer tað at økja innanhýsis spenningin í saudiarabisku kongsættini. Kongurin liggur á einum sjúkrahúsi í Sveits.



Ian Davidge úr Aith:

# Føroyingar eru so trúfastir móti kappróðrinum

**Í hesum døgum eru rógvarar úr Aith Rowing Club í Hetlandi staddir í Føroyum. Tey skulu luttaka í kappróðrinum á bátastevnuni í Suðuroy, sum verður um vikuskiftið. Tey eru stødd í Klaksvík, har tey eru á vitjan hjá Stuðulsfelagnum Draganum**

SUMMARGESTIR
*Solby A. Eliasen*



*Ian Davidge heldur, at føroyingar eru so trúfastir móti kappróðrinum*

**Klaksvík:** Ian Davidge, sum er ferðaleiðari hjá ferðalagnum úr Hetlandi, heldur, at tað er sera hugaligt at síggja, hvussu trúfastir føroyingar eru móti kappróðrinum. Hann sigur, at tað er stórur munur á, hvussu undirtøkan fyri kappróðri er í Føroyum og so í Hetlandi.

Eina av høvuðsorsøkunum til hetta, heldur hann vera, at í Hetlandi snýr so at siga alt seg um fótbólt.

- Fótbólturin hevur ovurhondstóran áhuga millum hetlendingar, og tað letur til at ganga út yvir kappróðurin hjá okkum millum annað, sigur Ian.

Hann vísir á, at eitt nú í Lerwick, sum er høvuðsstaður í Hetlandi, megna tey ikki at manna meira enn eina kvinnumanning. Onkuntíð hevur ein mannfólkamanning eisini verið, men tað er so eisini alt. Hann samanber tað við undirtøkuna fyri kappróðri í Havn, har ikki minni enn trý kappróðrarfeløg eru og nógvar manningar bæði við kvinnum og monnum.

- Tað er merkisvert, at tað ikki kann lata seg gera at manna meiri enn ein bát í Lerwick, serliga tá verður havt í huga, hvussu mong rógva í tykkara høvuðsstaði, heldur Ian, og hann leggur afturat, at tað eisini er stuttligt at síggja at so nógvar smábygdir eisini hava manningar við í føroyska kappróðrinum.

## Hvalvík/Streymnes íbirtarar

Ian Davidge greiðir frá, at tað hevur ikki altíð verið so í Hetlandi, sum tað er nú.

- Fyrr var áhugin fyri kappróðri í Hetlandi eisini sera stórur, men eg haldi, at vit hava sjálvi ein part av skuldini fyri, at áhugin dalaði tað eina tíðarskeiði, sigur hann.

- Tað er nú einaferð so, at hetlendingar taka ikki kappróðurin í so fullum álvara, sum føroyingar. Tað vil siga, at okkum dámar væl at fara ein túr í býin at hugna okkum, tá vit eru liðug at rógva – eisini mitt í kappingarárinum. Og tað gav pubbeigarunum og teimum, sum annars skipaðu fyri regattakappingunum blóð upp á tunguna, tí kappingarnar vístu seg at geva nógvar pengar í kassan. So tað endaði við, at tað vóru ikki minni enn 14 regattakappingar í einum kappróðrarári, og tað bleiv ov nógv av tí góða fyri nógvar rógvarar, sum so ikki tímdu meira.

Ian sigur tó, at støðan er batnað nógv síðani, og hon batnar støðugt enn. Í dag eru átta regattakappingar í Hetlandi um árið, og tað vísir seg at vera passaligt.

Ian sigur, at áhugin fyri kappróðri í Aith av álvara byrjaði at blóma aftur eftir at róðrarfelagið í Hvalvík/-Streymnesi hevði verið ein túr í Hetlandi í 1993.

- Tað var so at siga tey, sum góvu okkum eitt skump í baki at byrja at rógva aftur, so ein kann gott siga, at tey vóru íbirtararnir til at menna áhugan fyri kappróðri aftur í Hetlandi, sigur Ian og smílist.

## Møttust í Hetlandi

Vinarlagið millum Ian og hansara fólk og fleiri av limunum í stuðulsfelagnum Draganum hevur eina skemtiliga søgu.

Hetlendingarnir og limirnir úr Draganum vóru úti og ótu saman við umboðum frá Klaksvíkar Róðrarfelag mikukvøldið. Og tá nýtti Hans Eli Hansen, formaður í stuðulsfelagnum, høvi til at greiða frá, hvussu teir møttust.

Hann greiddi frá, at teir vóru nakrir frá Draganum farnir niður til Hetlands til eina seglbáta regatta, sum var har. Teir fóru bert fyri at eygleiða og fregnast.

Ein dagin, meðan teir gingu ein túr og avmyndaðu allar seglbátarnar, komu teir inn á eitt øki, har nógvir kappróðrarbátar stóðu. Tá fingu teir tað hugskotið, at fara og spyrja ein av bátaeigarunum, um teir ikki kundu læna ein bát til at fara út og avmynda seglbátarnar frá sjósíðuni. Teir spurdu onkrar aðrar, áðrenn teir komu til Ian, sum teir sjálvandi ikki kendu tá. Ian var blíður og lat teir læna ein av bátunum.

Tá teir vóru lidnir at taka myndir, kom ein bátur har og bjóðaði seg til at sleipa teir. Teir ánaðu ongi óráð og tóku gleðiliga av. Teir hildu, at teir fóru at verða sleipaðir innaftur, men har fóru teir skeivir.

Við eitt varnaðust teir, at teir vórðu sleipaðir út á 2.000 metra málið, har ein kappróður var um at byrja. Og so teir at rógva. Miðalaldurin á kappingarneytunum hjá teimum var mettur at vera um 20 til 22 ár, meðan hesir føroyingarnir vóru allir omanfyri 40 ár, so tað bleiv flent at teimum, tá teir komu har.

Men Hans Eli segði, at ikki bleiv flent líka nógv, tá róðurin var av, tí teir endaðu sum nummar 15 av 20 bátum.

Leggjast skal tó aftur at, at Ian helt, at teir bóðu um at læna ein bát, tí teir ætlaðu sær at rógva.

Men eftir henda dag vóru føroyingarnir saman við Ian og hansara fólki so gott sum hvønn dag, og eitt vinarlag fyri lívið var funnið.

## Fingu gamla Klaksvíking

Ian og teimum dámar væl tann føroyska kappróðrarbátin. Og síðst í 2001 løgdu teir ætlanir um at fara at royna at byggja ein føroyskan kappróðrarbát í Hetlandi. Men teir høvdu ikki mátini, so Ian ringdi til Fischer H. Johannessen í Klaksvík og spurdi hann, um hann kundi skaffa teimum teir neyðugu upplýsningarnar.

Fischer setti seg so í samband við Klaksvíkar Róðrarfelag og spurdi tey til ráðs. Men í Klaksvíkar Róðrarfelag gingu tey so spent júst tá og bíðaðu eftir, at tann nýggi Klaksvíkingurin skuldi koma frá bátasmiðjinum. So tey gjørdu ikki mætari enn at biðja Fischer spyrja sínar hetlendsku vinir, um tey ikki bara vildu hava gamla Klaksvíking, tí hann hekk sum eitt húsaskor í neystinum, og felagið hevði ikki pláss fyri honum, tá tann nýggi Klaksvíkingur fór at koma.

Hetlendingarnir tóku gleðiliga av. Og Ian kom til Føroyar eftir honum. Ian var staddur í Havn og bíðaði eftir, at báturin skuldi koma, men Dúgvan sigldi ikki vegna veður, so Ian fór einsamallur heim aftur við Claire. Men í januar 2002 fór so Fisher við Claire til Hetlands við gamla Klaksvíkingi sum viðføri.

Og glaðir vóru hetlendingarnir, tá teir fingu bátin.

## Til bátastevnu í Suðuroy

Sum sagt, so eru hetlendingarnir her í samband við bátastevnuna í Suðuroy. Hendan ferðin kom upp á tal tíðliga í ár, og tá bað Ian Fisher kanna møguleikarnar fyri at sleppa at rógva á Ólavssøku, men tað lat seg ikki gera, so tey tóku beinanvegin avgerð um, so at koma og verða við í bátastevnuni.

Men Ian sigur, at hann kemur ikki til Føroyar uttan at vitja í Klaksvík, tí hann hevur fingið so nógvar og góðar vinir har.

Og eftir sum at Róðrarfelag er í Klaksvík, so er tað so líka til, at tað verður skipað fyri kappróðri í Klaksvík hóskvøldið klokkan sjey millum kvinnur og menn frá Aith Rowing Club og Klaksvíkar Róðrarfelag.

Hetlendingarnir fara til Suðuroyar fríggjadagin, og tey fara heimaftur til Hetlands mánadagin við Norrønu. Ferðalagið hjá teimum telur eini 30 fólk.



*Hesir báðir hava knýtt sterk vinarbond, síðani Fischer og aðrir frá Draganum vóru ein túr í Hetlandi*